**Skrivligur fyrispurningur**
eftir § 52a í Tingskipanini

**Spyrjari:** Sirið Stenberg, løgtingsmaður

**Svarari:** Helgi Abrahamsen, landsstýrismaður í umhvørvis- og vinnumálum

**Evni:** SEV

**Spurningar:**

1. Ætlar landsstýrismaðurin, at SEV ikki skal kunna bjóða til komandi vindorkuútboð ?
2. Um ja, er semja millum Kommunufelagið, SEV og landsstýrið um hesa ætlan ?
3. Hvørjar lógarbroytingar ætlar landsstýrismaðurin at fremja á elveitingarøkinum ?
4. Kann landsstýrismaðurin upplýsa, um útrokningar eru gjørdar um, hvat hetta kemur at merkja fyri brúkaran av elorku ?

**Viðmerkingar:**
Í røðu síni undir viðgerðini av frágreiðing løgmans á ólavsøku vísti landsstýrismaðurin á, at semja var millum SEV og Kommunufelagið um broytingar í bygnaðinum í SEV.

Í miðlunum er røðan hjá landsstýrismanninum endurgivin soleiðis:
*"Í stuttum snýr semjan seg um, at net- og skipanarberandi tænastur framhaldandi verða skipaðar og riknar í lutafelagnum SEV. Tað vil siga, at tað sum tryggjar javna streymstyrki – sum til dømis dieselverk, vatnorkuverk og pumpuskipan, verður partur av SEV, meðan SEV ikki verður partur av varandi orkuframleiðsluni – sum fyrst og fremst verður vindmyllur"*

Hetta merkir at SEV frameftir ikki kann bjóðað uppá vindorkuútbygging.

Neyðugt er at fáa greiðu á, hvat landsstýrið ætlar í hesum álvarsmáli, og tí verður hesin fyrispurningurin settur.

**Á Løgtingi, 5. august 2021**

Sirið Stenberg